# Ferðsluátak á Torginum



*Ráðið fyri Ferðslutrygd kunnar hesa vikuna um ymsar vandar í ferðsluni, og ikki minst, hvussu hesir kunnu fyribyrgjast. Her er tað myndamaðurin hjá Dimmu, sum fær eina rundferð við Hvølvusi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hesa vikuna hevur Ráðið fyri fersðlutrygd stórt tiltak á Torginum í SMS.

Lyklaorðið fyri tiltakið er »Hjartarúm«, og við hesum er ætlanin at gera fólk meira tilvitað um tað, at vera til í ferðsluni. Og ikki minst, at vit ikki eru einsamøll, tá vit eru á vegnum, men at tað tvørtur ímóti eru nógv onnur, sum tað eisini skal vera rúm fyri.

Umframt umboð frá Ráðnum fyri ferðslutrygd, eru eisini onnur virki og stovnar við, sum onkursvegna hava við ferðslutrygdina at gera. Soleiðis kunnar Apotekið um heilivág, og hvussu hesin kann ávirka evni hjá bilførarum at taka røttu avgerðirnar. Løgreglan kunnar um tað arbeiðið, sum tey gera. Reyði Krossur, sum í nógvar mátar kann vera ein hjálp í ferðsluarbeiðinum, hevur síni umboð á staðnum. Og so eisini Landsverk, sum við sínum vegakervi jú hevur ein týðandi leiklut í ferðslupolitikkinum.

Hartil eru eisini privatar fyritøkur at síggja á Torginum. AMA sýnir fram koyristólar, Opel sýnir, hvussu tryggur ein bilur kann gerast. Dekk-sentrið kunnar um týdningin av góðum dekkum, og Føroya Tele kunnar um, at tað finnast nógvar hondfríar loysnir, um tú partú skalt tosa í fartelefon, tá koyrt verður.

-jm




**MERCEDES BENZ 200 D ÁRG. 1966**
Árg 1966, Hetta snotuliga ellisakfar, sum er í góðum standi, er til sølu. Bilurin er høvuðsumvældur og sproytlakkeraður fyri uml. tveimum árum síðani. Sum ellisakfar rindar hann ongan vegskatt og sera lítið í trygging. . Kr. 40.000.
**Tel 216409. ellis@post.olivant.fo**

i
Sosialurin

Vit søkja
**KT-fólk**
fá nærri at vita á
www.farodane.fo

**FARODANE**
Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311414 - farodane@farodane.fo

DANMARK

**Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar ella Billund**

Keypmannahavn
Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.
Tilboðið er galdandi til 21/03/2005
**2.212,-**
Íroknað prísin eru ferðing báðar vegir og ferðaavgjøld.

Billund
Fráferð skal verða hósdag ella fríggjadag. Heimferð skal verða sunnudag.
Tilboðið er galdandi til 20/03/2005
**2.238,-**
Íroknað prísin eru ferðing báðar vegir og ferðaavgjøld.

Bílegg ferðina á tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways.
Talið av ferðaseðlum er avmarkað. Úrvalgdar fráferðir.

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo